Skúlin er livur!

Ja, kanska hjá teimum, sum nú skulu í holt vi› próvtøkurnar á ymsu mi›námsskúlunum, men so slettis ikki hjá næmingunum í fólkaskúlunum. Har er hann nústa›ni byrja›ur.

Talan er sjálvandi um nærum tveir mána›ar langa verkfalli›, sum meira ella minni leg›i fólkaskúlan lamnan, og sum eisini hevur vi› sær, at næmingarnir nú mugu sita inni og lesa og læra, ísta›in fyri at hava eitt sindur av próvtøkum og annars njóta gó›a ve›ri›, sum hevur veri› seinastu tí›ina.

Yngd hevur práta› vi› nakrar av teimum næmingum, sum vóru raktir av verkfallinum. Higartil hevur mest veri› at hoyrt um, hvussu ke›iligt ta› var, ikki at sleppa í skúla, men eru ta› øll, sum eru av hesi fatan. Neyvan.

Hvussu ofta munnu vit ikki hava ynskt, at skúlin bara var stongdur í nakrar dagar, ella hvussu gla› eru vit ikki, tá ta› frættist, at lærarin er sjúkur og tí fáa tit frí nú í tveir tímar.

Okay, alt vi› máta, og tveir mána›ir uttan skúlagongd er kanska eisini for nógv av tí gó›a. Vit skulu jú øll fó›rast vi› eitt sindur av lærdómi hvønn dag, so vit eru betur før fyri at taka av teimum avbjó›ingum, sum lívi› gevur okkum seinni.

Sum vi› flestu lutum, so hev›i læraraverkfalli› eisini sínar gó›u og ringu sí›ur, og á mi›sí›unum hoyra vit eisini, hvat næmingarnir halda um hesar.

Ársins songrødd fer av barkastokki innan stutta tí›, og eisini hetta ber til at lesa um í Yngd hesufer›. Enn er ikki alt fingi› upp á pláss hesum vi›víkjandi, men ert tú áhuga›/ur í hesum, er bara eitt at gera, og ta› er at bo›a frá luttøku. Á›renn hetta skulu løgini tó veljast, og hvussu hetta ver›ur gjørt fæst at vita vi› at bla›a ví›ari.

Føstu teigirnir ber so sjálvandi eisini til at lesa um, solei›is at vit hava eitt sindur av hvørjum. Fløguummæli, tónleikatindar og slatur. Jú, Yngd er sjálvandi solei›is sum ta› eigur at vera, og eftir er bert at ynskja »Gó›an mikudag«

Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Yngd

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag!

Ársins songrødd enn eina ferð

Ársins songrøddir seinastu árini.
Á ovaru myndini Arnfríð Lützen. Á niðaru myndini Eivør Pálsdóttir

Nú ver›ur aftur fari› undir at kappast um at gerast ársins songrødd. Kappingin hesafer› er eitt sindur broytt í mun til undanfarin ár.

Hjá onkrum er ta› sangurin um frøknurnar, sum er ta› fyrsta hugsa› ver›ur um, tá tosi› fellur á ársins songrødd, og hjá onkrum ø›rum er ta› ungu songkvinnurnar Eivør Pálsdóttur og Arnfrí› Lützen, sum ver›a settar í samband vi› hetta tiltak.

Nú ver›ur bo›a› til ein n‡ggjan umgang av kappingini Ársins Songrødd. Nógv ver›ur gjørt burtur úr at fáa fólk at tekna seg. L‡st ver›ur í útvarpinum, umframt at ein heimasí›a eisini er fingin upp at standa. Á hesi heimasí›u fæst ein rúgva at vita um kappingina, og eisini ber til at bo›a frá luttøku har.

Pláss er eisini fyri bólkum

Ein av størstu broytingunum vi› kappingini í ár er at ársins songrødd væl kann blíva eitt fleirtalsor›. Hetta skal skiljast sum at nú hava sangbólkar møguleika fyri at tekna seg til kappina. Kappingin er tí ikki longur bara ein einstaklingakapping. Møguleiki er nú hjá gentu- og dreingjabólkum umframt sonevndum mixbólkum at tekna seg til kappingina, og hvør veit um vit ikki eiga okkara egnu Backsteet Boys ella Spice Girls í onkrum loftskamari har úti.

Sagt ver›ur, at vinnarin av ársins songrødd 2000 fær eina stóra peningagávu umframt at hann, hon, tær, teir ella tey eisini fáa eina rúgvu av gávulutum frá stu›lunum. Fyrireikararnir hava gjørt nógv burturúr í ár, og fara eisini at burturluta ymiskar gávulutir á heimasí›uni so hvørt tey innlei›andi umførini vera.

Fólkið skal velja løgini

Í mun til undanfarin ár tá fyrireikararnir einsamallir hava tiki› stø›u til hvørji løg skuldu vera at velja ímillum, so er eisini ein broyting á hesum øki í ár. Á heimasí›uni eru møguleiki hjá áhuga›um at koma vi› uppskotum. Seinasta freist fyri at koma vi› uppskotum til løg var sunnudagin, og tá Yngd hugdi inn á heimasí›una seinast vóru heilt fitt av løgum komin uppá listan. Millum løgini vóru eitt nú Shalalalala hjá Venga Boys, American Pie hjá Madonnu, 2 løg vi› Britney Spears, 2 løg vi› Backstreet Boys, og nógv anna› spennandi. Ætlandi vera ta› 25. ymisk løg hjá teimum luttakandi at velja ímillum tá avtornar

Seks innleiðandi umfør og finala í Havn

Seks innlei›andi umfør ver›a í kappingini í ár. Lagt ver›ur út í MB húsinum í Mi›vági leygarkvøldi› tann 13. mai. Í Klaksvík ver›ur kappingin í Lognbrá leygarkvøldi› tann 20. mai. Vikuskifti› eftir eru tvey umfør á skránni. Ta› fyrra ver›ur hildi› á Tvøroyri fríggjakvøldi› tann 26. mai, og ta› seinna á Strondum leygarkvøldi› 27. mai. Sandoyggin fær eisini vitjan av Ársins songrødd. Umfari› í Sandoynni ver›ur hildi› fríggjakvøldi› tann 2. juni. Seinasta innlei›andi umfari› ver›ur hildi› í Havn leygarkvøldi› 3. Juni. Finalan í kappingini um at gerast ársins songrødd ver›ur somulei›is hildin í havnini, og ver›ur ta› tiltaki› í Badmintonhøllini leygarkvøldi› 10. juni.

Vanligt hevur veri› at ymiskt anna› hevur veri› á skránni finalukvøldi›, og solei›is ver›ur helst eisini hesafer›, men enn fæst einki at vita um hvørjar ætlanir fyrireikararnir hava hesum vi›víkjandi, men einki er at ivast í, at alt ver›ur gjørt fyri at fáa eitt spennandi og undirhaldandi finalu kvøld tann 10. juni.